

»Nú er Dan fegin um, at Marjun gav honum sparkið at fara útum«

í børnini, tí flestu teirra hava urtagarð í dag.

So hvørt sum hann hevði planerað eitt petti, fekk hann plantur frá mammuni. So kom hugurin at keypa fleiri plantur, og hann setti seg at lesa um plantur, og um hvar hvør planta hóskaði best, alt í mun til sólargang, lívd og mold.

**Nógvar steinplantur**

Vestan fyri húsini eru nógvir stórir steinar, og allastaðni millum teir er plantað. Tað mesta grótið er frá einum kráarlagi hjá verfaðirinum á Kambsdali. Í hesum partinum av urtagarðinum eru fleiri sløg av steinplantum, ymisk steinbrot, og einastaðni hevur hann til stuttleikar sett eina kaktusplantu. Hann fekk at vita, at plantan toldi frost, so hví ikki royna.

Annars er Dan ikki millum teirra, sum draga avleggar heim úr útlondum. Allar hansara plantur eru úr gomlum urtagarðum, plantur hann hevur fingið ella keypt.

Í garðinum eru tún av brotsflísum. Túnið legði hann fyri fleiri árum síðan, keypti litað sement, stoypti stórar flatur og breyt tær so sundur.

**Fjølbroytni**

Hinumegin húsini er eitt stórt blómubeð við alskyns staudum.

Ein lítil hylur er við gullfiskum í. Hann hevur gjørt eitt springvatn og lagt ljós út í glaskúlur, sum flóta í hylinum.

– Ljósið riggar ómetaliga væl um kvøldið, sigur hann.

Beint oman fyri hylin tendur ein stór whisky-tunna. Tunnuna keypti hann í einum handli í Havn til sankutøð. Gras, greinastubbar og ókrút fer í hesa tunnuna, og tá ið eitt ár er farið, hevur hann frálíka góða mold.

Tann nógvi vøksturin í urtagarðinum dregur fugl til. Eitt kvørveggjupar hevur reiður í plantingini upp eftir bilhúsinum. Steggin er so spakur, at hann fer ikki undan hondini hjá Dan. Nú er Dan bara bangin fyri, at ketturnar kunnu fara avstað við tí spaka steggjanum.

**Positivt at herma**

Dan fegnast um vaksandi áhugan fyri at hava urtagarð.

– Áhugin er vaksin ógvuliga nógv seinastu árini, eg vil siga, at hann er eksploderaður.



*Í urtagarðinum er ein lítil hylur við gullfiskum í. Eisini er eitt springvatn og í hylinum flóta glaskúlur við ljósi innaní.*



*Stóra whisky-tunnan er prýðilig, men hon hevur eisini eina uppgávu. Tunnan verður brúkt til sankutøð. Alt ókrút, følnað og gras fer í tunnuna, og árið eftir fæstóføra góð mold*